## DAGSINS MEINING

# Vegamót á Atlantsmóti

Mitt í øllum valmeldrinum melur borurin hjá Sovereign Explorer við fullari ferð longur og longur niður í føroysku undirgrundina. Føroyingar standa spentir og spyrjandi, nú tvey týðandi úrslit skjótt verða avdúkað, tvey úrslit, sum kunnu fáa avgerandi týdning fyri framtíðina hjá okkum øllum.

Hóast hesi kanska einki beinleiðis hava við hvørt annað at gera, so hava tey tað kortini óbeinleiðis. Tí eitt oljufund við Føroyar kann fáa stóra ávirkan á framtíðina hjá hesi tjóð. Og verður olja funnin nú, so er givið, at hon fer at verða ein týðandi partur av orðaskiftinum undan komandi løgtingsvali. Men neyvan fæst nakað at vita um úrslitið av leitingini fyrr enn í næstu viku og tvs. eftir fólkatingsvalið. Tí vil fólkatingsvalið neyvan fara at snúgva seg um oljuna.

Mong spyrja, hvussu gongst við boringini. Tey eins og fjølmiðlarnir hava mestsum bara gitingar og óváttaðar keldur at ganga eftir. Tó so - nógvar av hesum keldum megu roknast sum rættiliga neyvar. “Okkurt áhugavert” er í undirgrundini, har Amerada Hess borar, er tað, sum blaðið hevur kunnað fingið burtur úr. Tosað verður um gass, møguliga olju eisini, men spurningurin er, um talan kann blíva um lønandi fund. Haraftrat hevur boringin nú fingið eina aðra dimensión. Mett verður at Hess hevur valt at forlongja boringina fyri at fáa nýggja vitan, ið skal koma teimum til góðar, tá farið verður at bora eftir tí sama strukturinum hinumegin markið næsta ár. Vit hava tí her eina sera áhugaverda støðu, har tað kanska longu eru ítøkilig prógv um, at Partnership samtakið, ið 2000 føroyskir partaeigarar eru við í, kann hava fatur í einum “felti”, sum liggur báðumegin markið.

Hetta er ein spennandi tíð fyri øll oljufeløgini, sum eru við í leitingini í hesum partinum av heiminum og ikki minst fyri tey samfeløgini, sum fáa og kunnu fáa ógóðan av møguligum fundum. Eitt fund á føroyskum øki og eitt ella fleiri aftrat á breskari síðu fara at merkja eina heilt nýggja avbjóðing fyri okkum og grannar okkara. Tey kunnu vera byrjanin til eina menning, sum uppá longri sikt kann koma at hava við sær stórar broytingar við sær her hjá okkum.

Um tvær vikur verður stór ráðstevna í Norðurlandahúsinum um tær fyrstu boringarnar við Føroyar og um møguligar avleiðingar av eini oljuvinnu. Uttan mun til um olja verður funnin nú ella ikki, so hevur ein slík ráðstevna stóran týdning, tí hon loysir upp fyri ivamálum, hon fær fólk at seta teir røttu spurningarnar og hon fær fólk í hesi nýggju vinnu at koma á tal hvør við annan. Eitt fund áðrenn ráðstevnuna vil sjálvandi seta gongd á orðaskiftið um spurningar so sum, um oljan skal í land í Føroyum, hvussu vit kunnu geva fólki tak yvir høvdið osfr. Tað fer so eisini at seta sín dám á eitt komandi løgtingsval. Í øllum hesum er umráðandi at halda høvdið kalt og hvørki undirmeta ella yvirmeta støðuna, hvør hon enn verður.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ringt er at hava yvirblikk við 18 nevndum!

**Heri Simonsen**
*proletarur við nøkrum hjáputrum!*

Tað er ótrúligt at ein neyðars postmaður og free-lance blaðmaður kann øsa ÍSF-forsetan so nógv.

Men tá ein situr í 18 nevndum og álitissessum, og er nógv uttanlands, er uttan iva torført at skilja vanligar føroyskar proletarar, sovorðnar sum neyðars meg. Helst man tað vera skemtið í B36-veitsluni, og baksíðugreinin um vespurnar, sum fær Heðin at "stinga" meg. Hevði tó ynskt at blivið "stungin" við meira broddi!

Eingin á "Fregnum" er "ímóti føroyskari olympiskari viðurkenning!". Vit eru bæði persónliga, ítróttarliga og politiskt fyri føroyskari olympiskari viðurkenning, meðan onnur eru bara persónliga og ítróttarliga fyri olympiskari viðurkenning. At hesi fólk ikki hava eina politiska stevnu, ið vinnur Føroyum altjóða viðurkenning í mongum alheims felagsskapum, tað verður teirra trupuleiki eina og aleina. Vit endaðu annars næstseinast við orðunum: "Vit ynska privatmanninum og ÍSF-forsetanum, Heðini Mortensen hjartaliga góða eydnu við at vinna Føroyum olympiska viðurkenning!" Men tá ein fjøltáttaður nevndarlimur er so út"lúgv"aður sum Heðin, gevst ikki altíð tíð at lesa alt. Nevndi onkur klongingð At Heðin tekur vendingina um "Hon er omma mín!" í fullum álvara, ger tað bara enn meira stuttligt fyri okkara viðkomandi.

Tó fegnast vit mest um orðini hjá Heðini: "Tað hevði sjálvandi verið lættari at vunnið ÍSF olympiska viðurkenning, um Føroyar høvdu fullveldi!" Tað eru also løtur har Heðin hevði ynskt....

Annars gav eg Heðini rætt ríkisrættarliga um Amer. Samoa, Guam og Karibisku oyggjarnar, jú tær hava ein paralell við núverandi ríkisrættarligu støðu Føroya. Men hesar oyggjar hava fingið viðurkenning frá teimum oceanisku og pan-amerikansku I.O.C.-limunum. Men Taiwan, Cook Islands, Hong Kong og Palestina er also framvegis ikki sambærilig. ÍSF hevur fingið játtað stuðul frá 8 evropeiskum I.O.C.-limum (Norður- og baltalond!), men enn eru 38 eftir. Vit ynska Heðini hjartaliga góða eydnu at yvirtala hesar 38 I.O.C.-limirnar. Men um Spania, Frakland og Stórabretland nokta ÍSF olympiskari viðurkenning, so er orsøkin ríkisrættarlig, um vit vilja tað ella ikki!

Skuldi annars undirhalda í eini jólaveitslu har Heðin verður hjástaddur.

Frægast man vera at avlýsa, tí Heðin skilur hvørki mín humor, tíansheldur tað eg skrivi!

# Javnaðarflokkurin hálaði krígspensjónina ígjøgnum

**Jákup Lindenskov**



Í longdini loysir tað seg illa at fara so lætt um sannleikan, Óli Breckmann!

Í framløgusendingini í Útvarpinum sunnukvøldið førdi Óli Breckmann fram millum mál, hann hevði framt sum fólkatingsmaður, krígspensjón til føroyskar fiskimenn.

Skal rætt vera rætt, krevur hetta eina viðmerking, tí Óli Breckmann er ikki sannur í hesum máli.

Óli Breckmann slepti hesum máli púrasta, tá hann hevði fingið bræv frá Esther Winter Andersen, táverandi sosialministara (V). Tað var aftan á, at vit høvdu havt ein fund við socialministaran, 10. apríl 1991. Tað frættist einki aftur frá hesum fundi. Men so sigur hon frá í brævi til Óla Breckmann. dagfest 23. juli 1991 m. a.:

"De færøske fiskere kan ikke generelt henføres under loven. Det ville være i strid med loven. Hvis det skal ændres, er det nødvendigt med lovændring.

Jeg synes ikke, at der er fremkommet noget nyt, der giver grundlag for en sådan ændring, og jeg ville også finde det meget uheldigt med en lovændring, der på dette sene tidspunkt henførte en ny persongruppe under loven. Det håber jeg, du har forståelse for."

Eg frætti einki um boðini, Óli hevði fingið, men tá eg so fekk frænir av, at einki meira fór at vera gjørt við málið, hvørki av stjórnini ella Óla Breckmann. setti eg meg beinleiðis í samband við samstarvsmenn mínar í Javnaðarflokkinum á Fólkatingi.

Eg fekk undirtøku frá flokssnevndini um krígspensjón fyri føroyskar fiskimenn, Tað varð sett á listan hjá Socialdemokratunum fyri at ganga inn fyri fíggjarlóg Fólkatingsins 1992.

Í skjalinum um "Aftale om finansloven for 1992 mellem Socialdemokratiet, Det konservative Folkeparti, Venstre, Centrum Demokraterne, Det Radikale Vestre og Kristeligt Folkeparti, er der indgået aftale om finansloven for 1992 - 9. punkt í avtaluni: Socialministeriet - stendur m.a.:

"Tilskudsordningen vedrørende erstatning til besættelsestidens ofre udstrækkes til også at gælde for færøske søfolk." - og eftir hetta varð ríkisstjórnin noydd at seta fram lógaruppskot í tinginum.

Tað er ikki tí, at Óli Breckmann. er tornæmur, at hann ferð eftir ferð kemur við ósonnu framførsluni um Krígspensjónina.

Eingin krígspensjón varð fyri føroyskar fiskimenn, varð málið ikki hálað ígjøgnum av Javnaðarflokkinum á Fólkatingi. Tá føroyski javnaðarmaðurin á Fólkatingi tók málið uppaftur, aftan á at borgarliga stjórnin hevði lagt málið til viks. Málið varð síðan samtykt av samdum Fólkatingi, flokkarnir høvdu gjørt semju um málið..

Eg skilji ikki framferð Óla Breckmans - at fara so lætt um sannleikan. Við hesi framferð verður tú bart út sagt brendur upp innanifrá.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14$^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.